# TAÐ SEINASTA NÝGGJA FRÁ **ASTRUP@EIK.FO**

**PERSÓNLIGA** HALDI EG, AT TANN **LUKKULIGASTI** ENDIN Á **TILGONGDINI** HEVÐI VERIÐ, UM **EIK BANKI** KUNDI VERIÐ **VARÐVEITTUR** Á FØROYSKUM HONDUM. **FORTREYTIN** FYRI TÍ ER HELST, AT **ÁHUGAÐIR** ÍLEGGJARAR Í **FØROYUM** GANGA SAMAN Í EITT **SAMTAK** OG **KEYPA** BANKAN, SIGUR **JØRN ASTRUP HANSEN**, SUM NÚ SITUR Á **STJÓRNARSKRIVSTOVUNI** Í EIK BANKA OG **RUDDAR** UPP Í BANKANUM. **KENSLAN** AT STÍGA INN UM **GÁTTINA** HJÁ **GAMLA** KAPPINGARNEYTANUM VAR **LØGIN**, MEN STARVSFÓLKINI HAVA TIKIÐ SERA VÆL ÍMÓTI **HONUM**, SO TANN LØGNA KENSLAN ER LONGU **HORVIN**, SIGUR HANN



**SAMRØÐA**

**Uni Arge**
ua@sosialurin.fo

Teldupostadressan sigur, at bankakreppa er í Føroyum. Jørn Astrup Hansen er fluttur inn á stjórnarskrivstovuna í einum føroyskum banka, ikki Føroya Banka, har hann var stjóri í 12 ár, men Eik Banka. Har situr hann nú sum uppruddari, ið skal endurreisa og selja áhugaðum íleggjarum tann føroyska partin av Eik.

Jørn Astrup Hansen er ein av mongu danskarunum, ið hava havt leiðandi størv í Føroyum, og nógvir fóru í gloymibókina. Men hann fer neyvan. Óttaleysur legði hann í vaðið sum stjóri í Føroya Banka í 90'unum at siga sína hugsan um bæði bankamál og samfelagsmál. Hann minti vinnulívsmenn við kovboymentaliteti á, at vinnuvirksemi má vera burðardygt, og hóast hetta skuldi verið sjálvsagt, varð hann fagnaður fyri at hava givið føroyskum máli hetta heilt nýggja orðið.

Soleiðis kann ein skørp og áhaldandi tunga skera inn á bein í einum veiðimannasamfelag, har ikki altíð verður tosað so nógv, men heldur ítøkiliga farið til verka at fáa fongin til høldar, ofta uttan fyrilit. Skjótt skilti hann føroyska málið og bygnaðirnar í samfelagnum, eisini teir óformligu. Í sínum ævigt analyserandi huga sá hann væl, hvørji tey stóru kapitaláhugamálini í samfelagnum vóru, og hvussu tey vóru knýtt at ávísum politikarum, og manga samráðing hevði hann við hesar menn.

Nú situr Jørn Astrup Hansen aftur soleiðis fyri, at hann er í samfelagsliga andglettinum í Føroyum. Tá Finansiel Stabilitet skuldi finna ein mann at endurreisa Eik Banka, heitti felagið uttan at blunka á Astrup um at standa fyri arbeiðinum, tí hann kendi Føroyar innanífrá. Kring stjórnarskrivstovuna Yviri við Strond í Havn, har Eik Banki heldur til, slota kapitaláhugamálini so nú og kanna, hvat Astrup hevst at. Áhugin at keypa tann føroyska partin av Eik er stórur, hevur Finansiel Stabilitet boðað frá.

Men ongin sleppur framat, fyrr enn Astrup er liðugur, og tí seta vit honum stevnu og spyrja, hvat líður við arbeiðinum.

### Hvør hevur verið tín uppgáva í Eik Banka higartil?

Fyribils eri eg stjóri í bankanum. Eg síggi tað sum mína høvuðsuppgávu at virka sum bindilið millum eigaran og Eik Banka í tí tilgongd, sum væntandi endar við, at bankin verður seldur. Og so leggi eg stóran dent á at kunna um, hvønn týdning tað hevur fyri kundarnar og samfelagið annars, at virksemið hjá bankanum er endað í Finansiel Stabilitet.

### Hvussu verður Eik Banki í Føroyum gjørdur klárur at selja?

Vit gjøgnumganga nú gjølla ogn og skuld hjá bankanum, so vit á nøktandi hátt kunnu greiða frá bankans støðu í tí upplýsingartilfari, sum verður latið møguligum keyparum.

### Hvussu stórur er áhugin fyri at keypa bankan? Nógvir áhugaðir keyparar?

Ja, áhugaðir keyparar eru. Samband við keypararnar hevur annars Finansiel Stabilitet, so eg síggi meg ikki føran fyri at gera fleiri viðmerkingar um hetta.

### Er ætlanin, at bankin skal seljast føroyskum eigarum?

Øll, sum eru áhugað, kunnu keypa Eik Banka. Bankin er tí ikki einans ætlaður føroyskum keyparum. Persónliga haldi eg kortini, at tann lukkuligasti endin á tilgongdini hevði verið, um Eik Banki kundi verið varðveittur á føroyskum hondum. Fortreytin fyri tí er helst, at áhugaðir íleggjarar í Føroyum ganga saman í eitt samtak og keypa bankan.

### Hvussu nógv kann væntast, at bankin verður seldur fyri?

Tað hava vit ikki gjørt okkum nakra kvalifiseraða meining um. Fyrst mugu vit jú líka hyggja at, hvat stendur í bókunum hjá bankanum.

### Hvussu er Eik Banki í Føroyum fyri, tvs. eru engagementini grundleggjandi sunn?

Vit hava nøkur eksotisk engagement,